

TIPS FRÁ INNU

inna@sosialurin.fo

# Bókstaviligt rák

RÁKIÐ VIÐ **BÓKSTAVUM** OG **SITATUM** HELDUR **FRAM**. SUMMI **YNSKJA** SÆR EITT **&-TEKIN** AT SETA Í **VINDEYGAÐ**, **MEÐAN** ONNUR **HELDUR** VILJA HAVA VÆL VALD **ORÐ** Á VEGGIN. HER ERU **NØKUR** AV MÍNUM **FAVORITTUM**




Á heimasíðuni www.alphabethbags.com kann ein bíleggja taskur við bókstavum, tølum ella sitatum á. Nógv velja at hava eina tasku við byrjunnarbókstavinum í fornavninum.







»Keep calm and carry on« er upprunaliga ein plakat, ið varð gjørd í Bretlandi undir øðrum heimsbardaga. Plakatin var prentað í 2,5 milliónum eintøkum, ið ongantíð vóru nýtt. 50 ár seinni fann ein maður eitt eintak og rammaði tað inn og hongdi tað í bókahandlinum, har hann starvaðist. Plakatin vakti stóran ans og er nú sera vælumtókt – bæði fyri sín boðskap og vakra grafikkin. Kann bíleggjast í ymiskum litum frá www.petrifiedinpink.se




Day at home hevur nógvar vakrar pútur. Hesar við sitatum og orðum á eru vælumtóktar.
Klivin



Sekkjalíknandi pútir frá House-doctor.
Frú C




Til tey yngstu er hendan plakatin pen og lærurík. Kann bíleggjast í ymiskum litum frá www.petrifiedinpink.se




Stílrein skelti frá Housedoctor.
Frú C

Orðatøk og vakrir bókstavar at seta á hillina ella í vindeygað.
Romantique








At tapetsera við bókstavum ber eisini til. Her er tað Boråstapeter sum mælir til, at vit bara nýta eina breidd til vøkru orðini »Home sweet home«.
Colorama